
Landsstýrið skal nú kanna grundstykkjasølur o.a. hjá Argja Kommunu:

Bygdarráðslimur skal sjálvur útstykkja stórt øki

— og fær sjálvur vinningin, sum kanska verður millum 20 og 30 milliónir.



Nú fer landsstýrið undir at kanna ymisk viðurskifti hjá Argja Kommunu.

Hetta hava íbúgvarnir á Argjum biðið landsstýrið um, tí tey halda, at kommunan hevur borið seg skeivt at.

Talan er um fleiri ymiskar grundstykkjasølur, sum borgarar á Argjum halda vera ógvuliga ivasamar.

Grovasta dømið er eitt øki, sum kommunan hevur selt P/F CEPA. Økið, sum liggur vestan fyri barnagarðin á Argjum, er 11.665 fermetrar til støddar. Og tað, sum eisini er áhugavert, er, at stjórin í

Hetta er skeytið, sum P/F CEPA hevur upp á grundstykki frá kommununi



P/F CEPA
P.O. Box 2196
FR-165 ARGIR

OGNARBRÉV

Við hesum skjali selir og endaliga avhendir Argja Kommuna við hesum eitt ídnaðarøki matr. 4ᵇᵇ Argir til viddar 11.665 m² til P/F CEPA, Argir.

Økið, sum er óbygt grundøki, verður latið keyparanum í tí standi, soleiðis sum tað nú liggur og við sonu rættindum, skyldum og ábyrgdum, sum seljarin framvanudan hevur átt tað.

Ognin hevur fulla hegnsvirðiliga rætt vegna og hálva hegnsvirðiliga rætt granna. Við tygnotan av hesi, skal dentur leggjast á, at hegnið gevur eina dánliga rønnu um avvarðandi ognir, og má eisini ansast eftir, at hegnið klæðir økinum sað út frá eini heildarmetan. Atalurætt hevur Argja Kommuna, og hvat viðvíkur ásetingunum um hegnsskyldu eisini eigarin av grannaognunum.

Ánarin av hesi ogn bindur seg til at fullføra byggingina av økinum innan 5 ár eftir, at endaligt skeyti fyriligur.

Verður ikki gjørt sum frammanfyri ásett, kann Argja Kommuna krevja sær ognarrættin til økið aftur, inntil fullum endurgjaldi av dokumenteraðum útreiðslum hjá ánarunum við rentu 12% pa. frá yvirtøkudegnum at rokna, hetta tó í fyrsta lagi frá tí at rokna, at ein útreiðsla er borin.

Tá Keyparin tekur við stykkinum, liggur tað fyri rokning hansara og ábyrgd.

Seljarin ásetur sær at syrgja fyri, at Keyparin fær rætt til økspláss íbinding í leiðingar til kloakk, vatn, ravmegn og telefon og íbinding í atlaða ringvegin í ørvi, um Keyparin ynskir hetta.

Keypspeningurin fyri sjálvt landið er kr. 618.245,00 - at skriva: seks hundrað átjan túsund tvey hundrað fýrati fimm 00/100 sum Keyparin rindar seljaranum sambært nærri avtalu.

Sum tryggd fyri keypspeningiognum letur Keyparin seljaranum eigarapantibrøv, stórt kr. 1.000.000,00.

Keyparin rindar fyri tinglesing av hesum ognarbrævi.

Sum seljari:
Argja Kommuna

Sum keypari:
ERIK MORTENSEN
STJÓRI
P/F CEPA
P.O. Box 2196
FR-165 ARGIR

Til váttanar um, at undirskriftirnar eru rættar, dagseting bein og undirskrivararnir myndugir.

P/F CEPA er eingin annar enn Carl Erik Mortensen, sum eisini er bygdarráðslimur.

Søgan um søluna av hesum stykki er í stuttum henda:

9. juni 1987 keypti P/F CEPA hetta grundstykkið frá Argja Kommunu fyri 618.245 krónur. Stykkið verður ikki goldið í reiðum peningi, men ein millión verður sett í veð.

Bert tveir mánaðir seinni lýsir hetta sama partafelag heilar tríggjar milliónir í veð í somu ogn.

Hetta halda argjafólk vera løgið og fær nøkur teirra at kanna málið nærri.

Annað endamál

Ein av teimum er Hjørleif Álaberg. Saman við øðrum var hann í landsstýrinum hósdagin, og bað landsstýrið um at kanna hesi viðurskifti.

Hjørleif Álaberg sigur, at CEPA keypti hetta stykkið upprunaliga fyri at byggja eitt góðskingarvirki á tí. Síðani eru hesar ætlanir sleptar. Við hesum heldur hann, at stykkið átti at fallið aftur til kommununa. Men so er ikki. Ístaðin hevur Argja Kommuna nú søkt fyri CEPA til landsstýrið um at fáa loyvi at stykkja út. Harafturat hevur Argja Kommuna í skeytinum til CEPA játtað at gjalda allar útreiðslur viðvíkjandi vatni, vegi o.ø. í samband við útstykkingina.

Nógvar milliónir í vinningi

Hjørleif Álaberg roknar við, at CEPA kann vinna millum 20 og 30 milliónir við hesum handli. Hendan prís byggir hann á eitt annað dømi við grundstykkjasølu hjá Argja Kommunu. Kommunan seldi herfyri trý grundstykki fyri ávikavist 585 krónur, 3.825 krónur og 5.025 krónur. Eitt av hesum stykkjum varð síðani selt aftur á privata marknaðinum fyri 1200 krónur fermeturin. Kann roknast við einum tilíkum vinningi hjá CEPA fyri sítt stykki, er vinningurin meira enn 20 milliónir.

Eitt er tað, at eitt ávíst felag, sum stendur kommununi nær, fær tílíkar sømdir sum eingin annar fær, men tað, sum eisini skal havast í huga, er, at kommunan hevur sum er alt ov lítið av byggilendi, sigur Hjørleif Álaberg, sum heldur hetta vera eina óbótaliga skaðagerð mótvegis borgarunum á Argjum.

Hann sigur, at teir hava mælt landsstýrinum til, at stykkini verða latin kommununi aftur, og tað er m.a. hetta, sum landsstýrið nú skal kanna. Hjørleif Álaberg leggur afturat, at tað eisini kann koma upp á tal, at bygdarráðslimir á Argjum sjálvir koma at gjalda eina stóra upphædd fyri hesa ógerð, sum borgararnir á Argjum eru á gosi um.

tór.-

Hetta er stykkið, sum Argja Kommuna hevur latið P/F CEPA fyri ein gávupris, sum Hjørleif Álaberg tekur til. Hann minnir á, at bygdarráðsformaðurin á Argjum, Erland T. Jacobsen, áður hevur upplýst alment, at grundstykkjaprísurin á Argjum er 200 krónur fermeturin.